# ítróttur

Nr. 243 • leygardagur • 20. desember 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Spennandi landslið



*1. januar skal føroyska kvinnulandsliðið í flogbólti royna seg. Hópurin til EM-undankappingina er nú úttikin og millum kvinnurnar eru tríggjar, sum er spildurnýggjar í hesum høpi*

*Savnsmynd*

**Kvinnulandsliðið í flogbólti er nú tikin út, og millum kvinnurnar eru tríggjar, sum eru spildurnýggjar í hesum høpi**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at teir báðir landsliðsvenjararnir, Niclas Joensen og Romica Pascu, í eina tíð hava vant við einum bruttohópi, er avgerðin um endaligu samansetingina av landsliðshópinum nú greið.

Nakrir nýggir leikarar eru við í hópinum, har rúm ivaleyst verður fyri onkrari debut. Eitt nú er bert 15 ára gamla Durita Ljósstein Johansen úr Mjølni við á liðnum, eins og Vivian Mikkelsen úr SÍ og Guðrið Syderbø úr Fleyr bert eru 18 ára gamlar. Eitt annað »nýtt« andlit er eisini Maria Skaalum Petersen. Hon var við á landsliðnum, tá oyggjaleikirnir vóru í 1995, men vegna lesnaðin hevur hon ikki verið eins aktiv síðani tá.

Í EM-undankappingini, sum verður hildin í Luksemburg, eru Føroyar í bólki við Cypros, Liktenstein og Luksemburg. Hin undankappingarbólkurin er samansettur av Írlandi, Íslandi, Grønlandi og Skotlandi. Føroyska liðið fer avstað 1. januar.

Annars skuldi manslandsliðið, sum er í Skotlandi til EM-undankapping, í eldin eftir døgurða fríggjadagin, tá Ísland var mótstøðuliðið, og væntandi verður okkurt at frætta frá teimum í týsdagsútgávu okkara.

# Føroyar vunnu á Australia

**Tað er í øllum førum søgan, um vit skulu trúgva upplýsingunum í velduga stóra fótbóltsleksikoninum hjá Ekstra-Bladet**

ÚTGÁVA
*Jákup Mørk*

Største danska fótbóltsárbókin, sum nakran tíð er gjørd. Somikið stór vóru orðini, tá danska Ekstra-Blaðið herfyri gav út nýggja fótbóltsbók, sum av sonnum brýtur upp úr nýggjum.

Her er nevnliga ikki bara talan um dystir, í farna árinum, og als ikki bara um dystir í Danmark. Snøgt sagt er talan um eitt veldugt fótbóltsleksikon, har hópur av upplýsingum um stórt sæð allan fótbóltsheimin eru at finna.

## Føroyskur feilur

Júst tí, hevur hon kanska ein nógv breiðari áhuga, enn fótbóltsárbøkurnar vanliga hava, og júst tí, er tað úr einum føroyskum sjónarhorni eyka keðiligt, at upplýsingarnar um føroyskan fótbólt ikki eru rættar.

Ikki tí. Orðini, sum føroyskur fótbóltur fær í múrsteina-tjúkku bókini, eru ikki tey heilt stóru: »På Færøerne har man spillet turneringsfodbold siden 1942. Landsholdet spillede sin første kamp i 1990, hvor det besejrede et glansløst og selvtilfreds australsk hold. I 2002 spillede det sensationelt uafgjort mod Skotland«

So vita vit í øllum førum tað. At tað var móti Australia, at Føroyar vunnu stóra sigurin!

Helst er tað ein feilur í týðingini av bókini, sum hevur viðført mistakið. Bókin er nevnliga týdd úr enskum, og har eitur Eysturríki sum kunnugt Austria, og tað kann onkur óvitandi týðari helst hava fingið til at vera Australia. Eisini hóast Australia neyvan nakran tíð kemur at taka lut í eini EM-undankapping.

## Fyrsti hópurin klárur

**Venjararnir hjá kvinnulandsliðnum í hondbólti hava tikið fyrsta bruttohópin út**

Tað eru teir báðir, Svein Rógvi Nielsen og Flemming Raben, sum hava fingið ábyrgdina av kvinnulandsliðnum, og í vikuni hava teir so givið 20 leikarum boð til venjingar. Umframt tær 20, sum eru nevndar, eru eisini aðrar føroyskar kvinnur, sum spæla hondbólt í Danmark, og roknast kann við, at onkur av hesum eisini fer at vera á landsliðnum.

Tær 20, sum í fyrsta umfari eru tiknar út, eru:
Helena Dam Poulsen, Neistin
LÍv Sørensen, Neistin
Marjun Tróndarson, Neistin
Unn Kragesteen, Neistin
Nikolina Eyðbjørnsdóttir, VÍF
Fríða Marjunardóttir, VÍF
Sóley Mikkelsen, VÍF
Tomma Petersen, VÍF
Anna Kristina Samson, Stjørnan
Annika Ljósstein, Stjørnan
Bára S. Klakstein, Stjørnan
Joan M. Djordjevic, Stjørnan
Una Olsen, Stjørnan
Gurið Mortensen, VB
Rannvá Augustinussen, VB
Beinta Joensen, StÍF
Sunfríð B. Jacobsen, StÍF
Fríða Petersen, Kyndil
Annika Thomsen, Kyndil
Heidi Maria Akselsen, Søljan
Ann Mari Káradóttir, Ajax/København

## Kvinnulandsliðið

| | |
|---|---|
| Juanna S. Joensen | Åbyhøj VK |
| Helen á Lakjuni Jacobsen | Rosenlund Volley |
| Maria Skaalum Petersen | Amager |
| Durita Ljósstein Johansen | Mjølnir |
| Gudrid Nolsøe | TB |
| Karin Mikkelsen | SÍ |
| Anna Müller Jacobsen | Mjølnir |
| Sólgerð Henriksen | Dráttur |
| Margit G. Joensen | Mjølnir |
| Gurðið Syderbø | Fleyr |
| Vivian Mikkelsen | SÍ |
| Marjun Kalsø | Mjølnir |

## Nýggjur FCK-leikari

**Ístaðin fyri Peter Nielsen hevur FCK keypt Michael Silberbauer úr AaB**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hósdagin eftir døgurða boðaði leiðslan í FCK frá, at felagið keypir Michael Silberbauer úr AaB. Tað er einki dulsmál, at FCK hevur leitað sær eftir einum styrki til miðvøllin, nú sáttmálin hjá liðskiparanum, Peter Nielsen, rennur út, og valið er so follið á stórtalentið hjá AaB.

Michael Silberbauer er 22 ára gamal, og tí hevur hann sjálvsagt ikki tær royndir, sum Peter Nielsen hevði. Men heilt óroyndur er hann tó á ongan hátt. Fyri AaB hevur hann longu leikt 111 superligudystir, har tað eisini er blivið til 21 mál, og hartil hevur hann leikt hópin av ungdómslandsdystum fyri Danmark.

Sáttmálin, sum FCK hevur gjørt við Silberbauer, gongur fram til 30. juni í 2008.



# Trý skip seld av landinum

**Kuba-trolarnir »Skúgvur« og »Munkur« hjá P/F Beta í Saltangará eru ávikavist seldir til keyparar úr Argentina og Gambia. Somuleiðis er línuskipið »Stapin II« selt til Danmarkar**

SKIPASØLA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*»Stapin« er seldur til Danmarkar*

»Skúgvur« og »Munkur« hava ligið við bryggju á Skála til sølu, síðani teir í november í fjør vóru avloystir av spansktbygdu partrolarunum »Stelki« og »Baki«.

»Munkur« verður umbygdur til frystitrolarar, meðan »Skúgvur« framhaldandi skal nýtast sum ísfiskatrolari. Føroysk manning skal sigla skipini til Afrika og Suðuramerika. Línuskipið »Stapin II«, ið hevur ligið á Toftum síðani nýggi »Stapin« hjá P/F Regn kom til Føroyar í fjør, skal byggjast um til eitt stuttleikafar við skrivstovu- og bústaðarmøguleikum. Keyparin er ein norðmaður sum er búðsitandi í Keypmannahavn, ið arbeiðir við at gera dokumentarfilmar.

Tað er skipsmeklaravirkið MARETEC á Argjum sum hevur skipað fyri søluni av teimum trimum skipunum.



*»Skúgvur« og »Munkur« eru seldir til Argentina og Gambia*




